# Flokssett í Námi

**- til lærugreinina føroyskt á C- og A-stigi**

# Tekstir eftir 1980













NÁM

**Juni 2024**

## Mariana Debes Dahl: Lokkalogi, 1984




"Alt er politikkur! Tá ið fólk verða dripin í hópatali, er tað politikkur. Tá ið milliónir doyggja í hungri, er tað politikkur. Tá ið en prestur á prædikustólinum roynir at spilla sosialistalond út, er tað politikkur. At sita tigand og blunda við samanløgdum hondum er politikkur. Ikki at tíma at fáast við politikk, er eisini politikkur." Skaldsøga um støðuna hjá teimum vinstrasinnaðu í Føroyum, mótvegis teimum neutralu.

## Marianna Debes Dahl: Onglalag, 1986




Um gentuna Guddu, sum kemur úr einum trúgvandi umhvørvi á bygd. Hon fer til Keypmannahavnar at ganga í skúla. Samstundis fer ein persónlig og politisk menning fram. Hon fær nýggjar vinir í skúlanum og við teimum kemur hon upp í altjóða samhugaarbeiði til frama fyri flóttafólk.

## Marianna Debes Dahl: Faldalín, 1988




Skaldsøgan lýsir eina kvinnu, sum frá barni mennist til eina sjálvstøðuga og sterka menniskju av royndum sínum: hon missir tíðliga móður sína, verður send á kostskúla í Danmark og fer síðani at læra til sjúkrasystur, kemur í samband við føroyingar í Keypmannahavn og giftist. Ein kvinnuskaldsøga í nútímans kvinnurørslumerking.

## Marianna Debes Dahl: Vívil, 1992




Bókin ger meira enn undanfarnar bøkur hjá Marionnu Debes Dahl vart við sjálva skrivingina. Hon sýnir fram tøk í skapandi rithøvundastarvinum bæði uttan fyri skaldsøguna og í søguni sjálvari. Og hóast hon eina mest lýsir hugsanir og kenslur hjá høvuðspersóninum Vívil, er sálarlýsingin blúgv.

## Marianna Debes Dahl: Úti á leysum oyggjum, 1997




Bókin “Úti á leysum oyggjum” er endurminningar hjá høvundanum tey fyrstu sekstan árini frá 1947 til 1964. Umframt at geva eina frálíka brotakenda tíðarmynd av nevnda tíðarskeiðið, er bókin fyrst og fremst søgan um eina viðkvæma gentu, ið veksur upp og búnast við teimum spurningum, gleðum og sorgum, sum ungdómar til alla tíð fara at gera.

## Steinbjørn B. Jacobsen: Hall, 1984




Hallur er ein stillførur grannskoðari júst afturkomin til Føroya eftir lokna útbúgving innan roknskaparfrøði. Hann hevur fingið starv, men eftir mong ár í útlegd hevur hann trupulleikar við at finna seg til rættis í føroyska samfelagnum í 80'unum, har pengarnir sita í hásætinum. Hallur sær, at alt ruggar ikki rætt, men kennir seg máttleysan.

## Steinbjørn B. Jacobsen: Kasta, 1991




Skaldsøgan fer í høvuðsheitum fram í Íslandi og umborð á íslendskum trolara seinast í 50'unum. Høvuðspersónar eru føroyingar, sum hava sæð, at íslendingar eru komnir longri við nútímans veiðihættum, og at korini eru frægari enn umborð á føroyskum skipum.

## Ruth Minsky Sender: Búrið, 1986




Vit fylgja einari 16 ára gamlari jødiskari gentu, Rivu, frá tí at týskararnir stongdu jødarnar inni í ghettoum í pólsku býunum, og til allir jødar verða fluttir í týningarlegur í Eysturproysalandi. Frásøgnin lýsir ikki bara nágreiniliga ræðuleikarnar í nasistisku týningarlegunum, men hon sigur okkum eisini frá menniskjum, ið halda saman og eiga ófatiliga styrki, kærleika og vilja at liva.

## Amy Tan: Eydnufelagið, 1989




Søgan fer fram í San Francisco og Kina, og er um tvey ættarlið av kinesiskum amerikanarum. Foreldraættarliðið, sum flýddi til USA undan japanarum, og tað unga ættarliðið, sum er føtt og uppvaksið í USA.

## Dánjal Pauli Danielsen: ... hvørt við sínar náðir, 1990




Søguligi karmurin er niðursetubygdin, har alt skal byrja av nýggjum, og høvundurin lýsir við hegni og hugflogi menniskjuni og tær lívstreytir, ið vóru teimum settar. Úr samrøðunum stíga persónarnir fram, og bygdin gerst ein heimur, har tað hevur eydnast høvundinum at skapa hugtakandi og fjølbroytta mynd av mannalyndinum.

## Martin Næs: Tvey, 1990




Nútíðarlýsing av føroyska samfelagnum. Heimafturkomin úr Danmark, roynir Bjarki at laga seg eftir føroyskum viðurskiftum. Umframt góða løn, fær hann eisini limaskap í tí rætta ølklubanum.

## Brian Moore: Tøgnin lýgur, 1990




Tøgnin lýgur, sum fyrstu ferð kom út í 1990, setur átrúnaðarligu og politisku trupulleikarnar í Norðurírlandi í sekstiárunum og frameftir í brennidepilin.

# Elin Mortensen: Barn undir krígnum, 1990




Søgan fer fram undir 2. heimsbardaga og er um eina familju, sum býr á Tvøroyri. Børnini Lisa, Mia og Jákup uppliva nógv spennandi og óhugnaligt. Bretar herseta Føroyar, og børnini gerast vinir við hermannin Jack.

# Elin Mortensen: Ljósini sloknað, 1996




Um ungfólk úr stórari bygd í Føroyum undir 2. heimsbardaga, serliga tríggjar vinkonur og teirra ójøvnu lagnur.

# Jógvan Isaksen: Blíð er summarnátt á Føroyalandi, 1990




Krimisøga. Blaðmaðurin Hannis Martinsson rannsakar umstøðurnar, tá ein kvinnuligur starvsfelagi doyr av vanlukku. Hann verður varugur við, at greinarøðin, ið kvinnan skrivaði um seinna heimsbardaga, møguliga hevur eitthvørt við deyða hennara at gera.

# Jógvan Isaksen: Gráur oktober, 1994




Krimisøga. Útvarpsmaðurin Páll Hansen doyr fyri opnari mikrofon undir døgurðatíðindunum. Ein bankaránari verður funnin hongdur í klivanum á politistøðini. Er samband ímillum deyðan hjá hesum báðum?

# Jógvan Isaksen: Krossmessa, 2005




Krimisøga. Tá tvey ung bretsk umhvørvisfólk verða funnin deyð millum hvalirnar á oljukaiini í Havn, fær tað felagsskapir um allan heim at fara í hernað móti Føroyum. Um somu tíð fær Hannis Martinsson vitjan og verður biðin um at finna út av, hvør ið hevur dripið tey ungu.

# Jógvan Isaksen: Adventus Domini, 2007




Krimisøga. Stutt fyri jól ringir ein umboðsmaður fyri stórmeistaran í Maltesaraordaninum til Hannis Martinsson og biður hann vera fyri sær á Farstøðini, tá ið hann kemur til Havnar. Frá tí løtu maltesarin er komin til Føroyar og til jóla, fara bæði løgnar og harðligar hendingar fram ymsastaðni í landinum.

## Jógvan Isaksen: Metusalem, 2008




Krimisøga. Ein dagin verður Hannis Martinsson ringdur upp av einum sandingi, sum sigur, at tann deyði maðurin, sum er funnin, er beiggi hansara. Frá hesum degi verður Hannis fløktur inn í eina røð av hendingum, sum hava træðrir aftur til skotska trolaran Red Crusader og hernaðarstøðina í Mjørkadali.

## Jógvan Isaksen: Norðlýsi, 2009




Krimisøga. Føroya nývaldi kvinnuligi løgmaður verður skotin, tá ið hon skal tendra jólatræið á Vaglinum. Stutt seinni verða tvey fólk brend inni umborð á einum báti á Vestaruvág. Hannis Martinsson arbeiðir aftur á Blaðnum og fer undir at kanna, um tað er ein samanhangur, og um illvilji ímóti samkyndum hevur nakran leiklut.

## Jógvan Isaksen: Norska Løva, 2010




Krimisøga. Færøernes Mellem- og Realskole er ein dagin í mai 1935 á útferð í Lamba fyri at síggja og hoyra um útgrevsturin eftir Norsku Løvu, sum fór á land nýggjársaftan 1707. Á útferðini hvørvur ein fjúrtan ára gamal drongur, og 75 ár seinni biður beiggi drongin Hannis Martinsson um at hjálpa sær við at fáa greiðu á málinum.

## Jógvan Isaksen: Deydningar dansa á sandi, 2011




Krimisøga. Ein maður verður funnin deyður niðri í fjøruni í Føgrulíð á Borðoynni. Hann er leinkjaður ímillum tveir steinar í sjóvarmálanum. Hannis Martinsson ørminnist, at hann hevur hoyrt um onkran sum var festur upp á hendan mátan áður, men hevur í fyrstani ilt við at koma í tankar um hvar. Skjótt fer kortini ein deyðadansur fram, sum fevnir úr Kunoy til Sumbiar, og træðrir eru nógv ár aftur í tíðina.

## Jógvan Isaksen: Tann fimti maðurin, 2012




Krimisøga. William Hammer er komin í starv hjá tí føroysku løgregluni og hevur fingið sína egnu deild í Skansahúsinum. Hann verður av danskari og bretskari fregnartænastu biðin um at finna ein skotskan veðurfrøðing, sum er horvin í Føroyum í 1970. Tað sigst, at hann var umborð á flogfarinum, sum datt niður í Mykinesi.

## Bergtóra Hanusardóttir: Skert flog, 1990




Søgan um Sunnivu er lýsing av lívinum hjá føroyskari kvinnu, fødd fyri aldarskiftið.

## Bergtóra Hanusardóttir: Suðar dýpið reyða, 1999




Stóridómur, resessirnar og Norska lóg Kristians V vórðu sum rættarreglur støðugt strangari í Føroyum í sekstandu og seytjandu øld. Hørð revsing og enntá deyðadómar vóru feldir í málum, sum lítlan og ongan týdning høvdu havt í dag. Sára Tummasardóttir var ein teirra, ið fekk slíkan dóm. Lívssøga hennara fer fram tíðliga í átjandu øld.

## Jóanes Nielsen: Gummistivlarnir eru tær einastu tempulsúlurnar, sum vit eiga í Føroyum, 1991




Hetta er fyrsta skaldsøgan hjá Jóanes Nielsen, og hon fer fram í Føroyum, meðan Fiskimannafelagsformaðurin enn hevði forbókstavirnar EP og ein hvíthærdur sakførari í Havn var uppi í fólkafylkingini ímóti EEC.

## Jóanes Nielsen: Páskaódnin, 1997




Skaldsøga, sum fer fram í Havnini undir einum ódnarveðri.

## Jóanes Nielsen: Glansbílætasamlararnir, 2005




Søga um fimm lagnur úr sama flokki, fimm dreingir í Sankta Frans skúla í Havn, sum doyggja á ungum árum.

## Jóanes Nielsen: Brahmadellarnir, 2013




Søgan byrjar í Havnini í 1846. Hon er um teir tríggjar brahmadellarnar Gamla Tóvó, Tóvó og Bettu. Um norska korpurálin Nils Tvíbur, læknan Napoleon Nolsøe og hansara tilstundandi frú Henriettu Løbner, og um onnur hampafólk sum livdu tey árini tá so nógv broyttist í Føroyum. Ein umleið 150 ára long søga, lýst gjøgnum eygu Eigil Tvíburs, sum kom at gerast ein av frægu høvundum Føroya.

## Gunnar Hoydal: Undir suðurstjørnum, 1992




Høvundurin ger eina ferð aftur til londini í Andes í Suðuramerika, og hetta verður samstundis ein ferð aftur í hansara egnu tíð og ta gomlu tíðina hjá upprunafólkinum har. Við Pablo Neruda sum leiðarstjørnu ferðast høvundurin millum tíðir og støð, tó altíð við heimlandinum sum útgangsstøði.

## Gunnar Hoydal: Dalurin fagri, 1999




Drongurin Páll veksur upp millum tey sjúku á bróstsjúkrahúsinum. Søgan tekur við um várið, tá ið gentan Sigrid kemur í dalin, har sjúkrahúsið stendur, og endar summarið eftir, tá ið hon verður førd úr aftur dalinum.

## Haruki Murakami: Sunnan fyri markið, 1992




Hajime elskar bæði konu og døtur, og tað gongst honum væl sum barreigari. Alt sær út til at vera so sára gott. Tá barndómsvinkonan Shimamoto brádliga aftur trínur inn í lívið hjá Hajime, verður hon ímyndin av tí tómrúmi og longsli, sum hann hevur kent øll árini.

## Per Nilsson: Hjartans frygd, 1992




Hjartans Frygd sigur okkum av nýggjum gomlu søguna um hin fyrsta kærleikan. Tú verður hugtikin og lurtar, sum var tað fyrstu ferð - og tú smílist og kennir alt aftur, bæði ovfarakæti og svartasta vónloysi.

## Per Nilsson: Gorpur krunkar, 1994




Ein spennandi, litrík, gátufull og stuttlig krimisøga. Bókin snýr seg um eina gentu, sum er ljós og vøkur, eina sexuta rokkstjørnu, ein svartklædddan mann, sum ikki fírir fyri at drepa, ein vinmann sum doyði - ella varð dripin.

## Oddvør Johansen: Ein mamma er ein mamma, 1993




Um mammur av ymsum slag og um føroyskar einsamallar mammur í Keypmannahavn.

## Oddvør Johansen: Í morgin er aftur ein dagur, 1998




Søgan fer fram í Havnini stutt aftan á ár 1900. Símun og Sigurd eru brøður, og tað er Símun, sum sigur frá við støði í dagbókunum hjá Sigurdi. Pápi teirra, Dánjal í Køk, druknar, tá hann roynir at bjarga einum útlendingi, men prestur noktar at hýsa líkinum í kirkjuni, tí hann heldur, at talan er um sjálvmorð. Hjá konuni Angeliku er støðan ikki góð, men hon gevst ikki á hondum. Bókin er ein lýsing av mannalagnum í sorg og gleði og gerandisstríði í eini broytingartíð, tá menningin á landi tekur dik á seg, og tey ognarleysu berjast fyri betri korum.

## Oddvør Johansen: Tá ið eg havi málað summarhúsið, 2001



Fer fram í Havnini í 90-árunum. Samfelagskreppa og rúsevni gera tað ikki lætt fyri tann hálvvaksna Pedda at fóta sær í samfelagnum, men eisini fyri hann er vón fyri framman.

## Oddvør Johansen: Sebastians hús, 2004



Sebastians hús fevnir um tíðina frá 1890'unum til 1950'ini og sigur frá lív og lagnu hjá teimum, sum eru knýtt at húsunum á Skálatrøð.

## Mats Wahl: Vetrarvíkin, 1993




John-John veksur upp hjá mammu og systur síni í Stokkhólmi. Litta pápan hjá sær minnist hann ikki, hann er langt síðan fluttur aftur til Amerika. Men hann droymir ofta um hann. Hjá teimum býr eisini "Gorlakkurin", nýggi maðurin hjá mammuni, ið fæst við ymiskt ólógligt. John-John hatar hann av heilum huga. Arbeiðsuppgávur eru tøkar.

## Torill Eide: Ørindi í loyndum, 1993




16 ára gomul fer Ingrið inn í býin at ganga í studentaskúla. Hetta er fyrst í sekstiárunum í Noregi. Ferðin til býin er samstundis ein ferð úr barndóminum og inn í vaksnamannaheimin. Tað vaksna lívið er dragandi, men ikki er so lætt at fáa kærleika, dreymar og veruleika at hanga saman.

## Einar Már Guðmundsson: Alheimsins einglar, 1995




Í skaldsøguni Alheimsins einglar býr frásøgumaðurin Páll á sinnissjúkrahúsi. Páll skal eitast at vera svakur, men tá ið samanum kemur, er hann kanska ikki stórt galnari enn øll tey, sum laga seg eftir einum vitleysum samfelag.Inn í frásøgnina hjá Páll verða flættaðar søgur og lagnur hjá mongum av teimum, sum hann hittir á leiðini. Donsk undirvísingargongd er tøk.

## Mina Reinert: Duldar leiðir, 1996




Krimisøga. Jenny hevur føroyska mammu og eingilskan pápa. Sjálv er hon uppvaksin í India. Hon giftist einum týskum aðalsmanni, sum doyr brádliga, og flytur til Føroya. Hon fær arbeiði á einum edv-virki, men varnast skjótt, at ymist løgið fer fram.

## Erling Pedersen: Lívið er eitt spæl, 1997




Eyði og Áki hava altíð verið vinmenn, og báðir ganga á studentaskúla á Kambsdali. Áki hevur tikið koyrikort, so nú ber alt til. Men so kemur Lisa upp í leikin...

## Per Nilsson: Anarkai, 1998




Skaldsøga. Jóhan er oftast einsamallur. Ongantíð kemur nakar at vitja, og sjáldan ringir telefonin. Hann situr framman fyri telduni, lesur, hugsar og droymir. Men tann dagin, Anarkai kemur, broytist alt.

## Jens Pauli Heinesen: Ein ódeyðilig sál - og aðrar, 1999



Saman við Kánusi og Mass Foss hittir lesarin eina rúgvu av persónunum úr skaldskapinum hjá Jens Paula Heinesen, og enn einaferð kann lesarin flyta seg inn í eina fjølbroytta verð, sum er so beistaktiga lík okkara egnu. Og sum Kánus sigur: Tíðin er ikki til.

## Annfinnur í Skála: Hjá dvørgum í Niðafjøllum, 2000




Fyrri partur av søguni um Heimin forna. Kjartan og Hallbera eru tvey 18 ára gomul ungfólk, sum enda í eini fornari tíð, tey verða tikin av dvørgum og send eina sera vandamikla ferð. Endamálið er at bjarga heiminum undan ragnaroki. Umframt dvørgaheim, vitja tey eisini álvaheim og tann ræðuliga staðin Xalar í vargmannalandi. Á vegnum fáa tey hjálp frá bóndanum Oddvaldi og syni hansara Arngrími, sum kemur við teimum. Tey verða tikin til fanga - fyrst Hallbera og seinni Kjartan - men eftir nógv brøgd og nógvar listir sleppa tey heim aftur. Ferðin er sera spennandi, og lesarin livir seg inn í ævintýrheimin.

## Annfinnur í Skála: Ferðin til Zambora, 2000




Seinni partur av søguni um Heimin forna. Kjartan og Hallbera eru tvey 18 ára gomul ungfólk, sum enda í eini fornari tíð, tey verða tikin av dvørgum og send eina sera vandamikla ferð. Endamálið er at bjarga heiminum undan ragnaroki. Umframt dvørgaheim, vitja tey eisini álvaheim og tann ræðuliga staðin Xalar í vargmannalandi. Á vegnum fáa tey hjálp frá bóndanum Oddvaldi og syni hansara Arngrími, sum kemur við teimum. Tey verða tikin til fanga - fyrst Hallbera og seinni Kjartan - men eftir nógv brøgd og nógvar listir sleppa tey heim aftur. Ferðin er sera spennandi, og lesarin livir seg inn í ævintýrheimin.

## Mark Haddon: Gátuføra málið um hundin í náttini, 2001




Søga fyri ung. Fimtan ára gamli Kristoffur hevur autismu. Hann hevur skil fyri støddfrøði og náttúruvísindi. Tað hann ikki skilir, eru onnur menniskju. Tá ið hann ein dagin finnur hundin hjá grannanum dripnan, ger hann av at fara undir at skriva eina søgu um morðgátuna.

## Sara Kadefors: Sandor/Ida, 2001




Søga fyri ung. Ida býr í Stokkhólmi og Sandor í Gøtuborg. Bæði kenna seg einsamøll og sakna onkran at tosa við. Á netinum finna tey hvørt annað og gerast sálarvinir.

## Jostein Gaarder: Appilsingentan, 2003




Skaldsøga fyri ung. Georg er 15 ár. Ein dagin finnur hann eitt bræv frá deyða pápa sínum. Í brævinum skrivar pápin um kærleikan til lívið, um leitanina eftir tí gátuføru appilsingentuni, og um áhuga sín fyri alheiminum og stjørnufrøði.

## Per Petterson: Út at stjala ross, 2003




Tróndur flytur til eina fjarlagda, lítla smáttu. Her roynir hann at skapa sær eina nýggja tilveru, langt burtur frá lívinum sum býarbúgvi. Men tankar hansara leita til summarið 1948, og hann fer so smátt at plágast av teimum.

## Sjón: Skugga-Baldur, 2003



Eitt stórt farmaskip fer á land í Íslandi veturin 1868. Umborð er gentan Abba, sum hevur Downs syndrom. Plantufrøðingurin Fríðrikur tekur gentuna til sín, tí honum tykir synd í henni. Undirvísingargongd til lærugreinina føroyskt á A-stigi er tøk.

## Janne Teller: Um kríggj var í Norðurlondum, 2004



Høvundurin bjóðar lesaranum at gera eina hugaroynd. Við at venda sjónarhorninum á fær hon okkum at skilja, hvat tað í veruleikanum merkir at vera flóttafólk. Donsk undirvísingargongd er tøk.

## Dagny Joensen: Hvirlan, 2005




Søga um kvinnulagnur í føroyska samfelagnum frá undan seinna heimsbardaga og til í dag.

## Carl Jóhan Jensen: Ó - søgur um djevulskap, 2005



Søgur um vampýrar, trúboðar og annað valafólk. Um djevulskap, sum fer víða um í tíð og rúmi. Frá trýss-árunum aftur í nítjandu øld. Úr tí avbyrgda Dalinum vesturi í Vágunum og suður á evropeiska meginlandið, heilt at Svartahavstrondum.

## Arne Svingen: Svart fílabein, 2005




Ein ungur norðmaður fer saman við vinmanninum Sam til Fílabeinsstrondina, eitt land í borgarakríggjð, at leita eftir mammu Sam. Vinalagið verður trároynt, og óvæntaðar hendingar eru verri, enn nakar kann ímynda sær.

## William Smith: Gagnligt lív, 2009




Krimisøga. Gamla Hvalastøðin við Áir er vorðin umbygd til eitt altjóða privathospital, har eirindaleysur handil við lívgøgnum fer fram í tí dulda. Børn verða rænd úr tilafturskomnum londum í fjareysturi. Gøgnini verða tikin úr teimum og seld múgvandi fólki.

## Rannvá Næs Hoydal: 7 dagar í helviti, 2009




Søga fyri ung. Ræðusøga um ein føroyskan vampýr.

## James Riordan: Sniðskjúttin, 2009




Søga um ein tannáring, ið gjørdist sniðskjútti í 1942. Hansara uppgáva var at skjóta so nógvar týskar hermenn sum gjørligt. Í byrjanini kennist tað sera torført at skjóta, men so við og við gerst tað lættari.

## Malala Yousafzai: Eg eri Malala, 2013




Malala Yousafzai (f. 1997) sigur søguna um, hvussu hon, sum 12 ára gomul, nærum var dripin fyri stríð sítt fyri, at gentur skulu sleppa at ganga í skúla.

## Simon Stranger: Tey, sum ikki eru til, 2014




Søga fyri ung. Pappírsleys menniskju búgva alla staðni, tey, sum ikki eru til. Samuel veit, hvat tað vil siga at lata alt frá sær við vón um eitt nýtt og betri lív í Evropa. Hann hevur gjørt tað fyrr; tá ið hann flýggjaði úr Vesturafrika til Kanariuoyggjarnar. Ta ferðina royndi Emilia at hjálpa. Kortini varð hann funnin og sendur aftur. Tað seinasta, Emilia gav honum, áðrenn hann varð noyddur avstað, var ein pappírslepi við bústaði hennara á. Nú stendur Samuel uttan fyri húsini, har hon býr í Bærum.

## Rakel Helmsdal: Hon, sum róði eftir ælaboganum, 2014




Søgan um gentuna Argantael er um sálarkvøl, um ov lítlan og ov nógvan kærleika, um sakn og angist hjá eini ungari kvinnu. Arbeiðsuppgávur eru tøkar.

## Rakel Helmsdal: Kjarr, 2020




Ein beinagrind í einum kjarri. Ein knústur barndómur. Ein verð, sum tú ikki visti var til, men kanska hoyrir heima í. Eitt lítlafingurbein í lummanum og ein ryggsekkur á bakinum. Søgan um Lauru er ein ferð ígjøgnum minnir, manesjur við logandi kyndlum og ein leitan eftir svarum upp á brennandi spurningar. Einasta vitnið: dagbókin.

## Høgni Mohr: Fractura nasi, 2017




Høvundurin ferðast runt Føroyar á súkklu. Tilsamans súkklar hann 1300 kilometrar. Á leiðini viðger hann m.a. sína egnu sorg og tað, sum hann heldur vera skilaleysan tíðindaflutning.

## Oddfríður M. Rasmussen: Ikki fyrr enn tá, 2019




Tey eru eydnurík saman, men sum tíðin gongur, varnast hann, at hon broytir atburð og verður fremmand og øðrvísi. Hon megnar ikki arbeiðsuppgávurnar, og á arbeiðsplássinum eru tey ørkymlað. Hon verður kannað, og staðfest verður, at hon hevur illkynjaðan knykil í heilanum. Hvussu livir tú við tí, at kvinnan, tú elskar, hvørvur frá tær í smáum? Hvussu bert tú teg at, tá ið tann, tú elskar og livir saman við, broytir persónsmensku? Hon doyr, og umframt sorgina um at missa konuna kemur sjálvseymkanin, sum gevur honum høvi til at drekka sær sorgina burtur.

## Marjun Syderbø Kjelnæs: Sum rótskot, 2020



Ungdómsskaldsøgan Sum rótskot kom út í 2020. Tey fýra, Fríða, Miriam, Pax og Steffan, stríðast á hvør sín hátt og saman um at fáa gerandisdagin at hanga saman og at tora at trúgva upp á framtíðina. Bókin snýr seg um at vera ung í einum stórum og fløktum heimi, og hon viðger nógv evni, sum eru viðkomandi fyri tey ungu. Arbeiðsuppgávur eru tøkar.

## Elin Michelsen: Rimarúmið, 2021




Tóra veit, at hon hevur gjørt okkurt galið, men hon minnist ikki, hvat tað er. Hon endar í einum skúla, hon aldrin hevur hoyrt um, saman við fólkum, hon aldrin hevur sæð fyrr. Og tey duga ymiskt. Ymiskt, sum ikki eigur at vera gjørligt, sum eingin eigur at duga. Hon kann ikki vera ein teirra, kann hon? Fyrsta bókin í røðini um Tóru og hennara stremban eftir at finna útav, hvør hon sjálv er í einum heimi, sum vísir henni eina síðu, sum Tóra ikki ánaði var til. Arbeiðsuppgávur eru tøkar

## Ingun Christensen: Sólgrátur, 2022




Aud er 15 ár og ættleidd. Hon heldur, at lívið er strævið. Í skúlanum rópa tey ymiskt eftir henni. Eisini er Aud kedd um mammuna, sum ofta liggur í songini. Hon kennir seg einsamalla og ger sær nógvar tankar um Colombia, haðani hon er ættleidd. Støðan verður ikki betri, tá ið hon byrjar at fáa ólekkur boð inn á telefonina frá ókendum nummari. Við eitt verður alt bara enn truplari enn frammanundan. Arbeiðsuppgávur eru tøkar.

## Jón Thorsteinsson: Tám, 2022




Anja flytur aftur til Føroya við soni sínum, og tey royna at fóta sær á bústaðarmarknaðinum í høvuðsstaðnum. Seinni vísir tað seg, at vandar liggja og lúra. Teir hótta tann nýggja kærleikan í hesi søguni um broytingar, strembanir og brotsgerðir. Undirvísingargongd til lærugreinina føroyskt á A-stigi er tøk.

## Jens Pauli Heinesen: Tann gátuføri kærleikin, 1986




Søgusavn í trimum pørtum. I: "Hví skrivar tú?," "H.A. Djurhuus" og "Yrkingin talar við sítt skald." II: "Ein ævintýrlig søga um tvey merkilig mannabørn," "Ein lítil, poetisk søga um Tórir og Sólvá" og "Ein skaldsøga um frú A." III: "Á søgunnar bráðpannu," "Ein glampandi glæstriborg" og "Á hesperisku strondum.".

## Jens Pauli Heinesen: Rósa Maria, 1995




Stuttsøgusavn við tíggju søgum. Søgurnar eru sera fjølbroyttar. Tær fevna frá tí skemtiliga, tí satiriska, tí siðsøguliga, tí syrgiliga, tí sálarfrøðiliga og einum hópi av erotiskum søgum, ikki minst í hesum savninum, sum lýsir kærleikslívið, tað ediliga kenslulívið millum kynini uppá gott og ilt.

## Frostrósan og aðrar søgur




Savn við stuttsøgum: Frostrósan, Eisini kærleiki, Kanska, Eyguni, Eingin veit á morgni at siga, Gentumyndir, Men størstur er kærleikin, Ónýtilig, Gamla Lotta, Tung lagna - lætt lyndi, Hugmynd, Ein kristin kvinna, Tá ið omma var ung, Tá mamman græt, Lív, Kastað burtur, Mín bústaður, Perlur og Katrin. Arbeiðshefti er til bókina.

## Heine Hestoy: Sum ravnar um deyðseyð, 1987




Stuttsøgusavn við seks søgum: "Ein dagur og annar", "Eg elski teg hvønn tórsdag", "Bara til stuttleika", "Sum ravnar um deyðseyð", "Ein søga" og "Tvey skip".

## Lydia Didriksen: Gráglómur, 1992




Søgurnar í hesum savni ferðast ikki eftir realistiska høvuðsrákinum í føroyskum bókmentum. Á ein hátt eru tær kortini realistiskar og lýsa gerandisumhvørvi. Men longri tú lesur áfram, greiðari gerst, at hetta bert er yvirtromin, at nógv annað býr undir. Søgurnar hjá Lydiu Didriksen eru øðrvísi enn føroyskar søgur flestar. Tær eru stuttar, ofta surrealistiskar og altíð symbolskar. Tám valdar mangan, og hetta dregur í sínum lagi tað óveruliga fram. Menniskju og umhvørvi glíða saman og gera eina ógreiniliga heild. Høvundurin roynir at fara niður í sálardýpdir, har okkara skaldskapur sjáldan ferðast, niður har sterk kynslig rák ganga.

## Bergtóra Hanusardóttir: Loynigongir, 1993




Søgurnar kunnu lesast hvør sær, men eru um somu tíð hugsaðar at gera eina heild. Sjónarhornið er hjá gentuni – kvinnuni – og tað er hennara fatan av umheimi og hendingum, sum lesarin fylgir við í. Stundum sigur eitt eg frá, stundum fylgja vit gentuni og stundum verður hon nevnd Súsanna. Súsanna gongur í skúla, hon fer niður at lesa, og hon kemur heim aftur at gerast partur av samfelagnum. Innan henda tríbytta karm eigur kærleikin – og tað sum av honum stendst – ein týðandi tátt. Men ótryggleiki og ivi gera seg galdandi á mongum av lívsins økjum – og ikki at gloyma: deyðin. Longsul og stremban eru líkaleiðis eyðkenni fyri hesar áhugaverdu og lættlisnu søgur.

## Einar Joensen: Nemesis á útoyggj, 1993




Savn við fýra krimistuttsøgum: Nemesis á útoyggj, Eiturormar í deyðagrasi, Jandus og Meinlíkin.

## Oddvør Johansen: Á Káta Horninum, 1995




Savnið er sett saman av endurminningum og hugleiðingum, har Oddvør Johansen við sínum eyðkenda skrivingarlagi ger rámandi myndir av lívi og levnaði.

## Rakel Helmsdal: Søgur úr Port Janua, 1996

Í bókini eru ein sjónleikur og trettan søgur um 13 ára gamla Tino og einstakar íbúgvar í býnum Port Janua.



# Marjun Syderbø Kjelnæs: Ein farri av kolvetni, 2004




Stuttsøgusavn við níggju søgum: Lykilin. Ísakur og Ísmael, Yndis, Rekadreki, Ein farri av kolvetni, Kavaeingil, Gráar hurðar, Tigandi vitni og Leinkjan.

# Marjun Syderbø Kjelnæs: Skriva í sandin, 2010




Í tíggju pørtum hoyra vit um eitt vikuskifti í Havn hjá nøkrum gentum og dreingjum í 16-20 ára aldri. Søgurnar flættast saman, og vit hoyra um ymsu hendingarnar frá ymsum sjónarhornum.

# Elskar elskar ikki




Stuttsøgusavn við 10 stuttsøgum, ið er úrslit av samstarvi millum øll Norðurlond. Søgurnar eru um kærleika. Lukkuligur og ólukkuligur kærleiki, um at vera samkyndur og forelskaður, um at verða forfylgd av einum, sum heldur seg elska teg, men sum í grundini bara vil hava tamarhald á tær, um umstøður, sum gera, at tú meira enn nakrantíð hevur kærleika fyri neyðini.

# Ingun Christensen: Skuggamyndir, 2015




Savn við 9 stuttsøgum: Tann ungi drongurin, Kvinnan í reyða regnfrakkanum, Maðurin við yvirskegginum, Myrkhærda gentan, Tann brúnoygdi, Konan við bláestrinum, Kvinnan við barnavogninum, Ungi maðurin við keppinum og Gráhærdi maðurin. Undirvísingargongd til lærugreinina føroyskt á A-stigi er tøk.

# Sámal Soll: Glasbúrið, 2015




"Glasbúrið" er fyrsta stuttsøgusavnið eftir Sámal Soll og kom út í 2015. Fleiri av søgunum hava tó frammanundan staðið í tíðarritum og bløðum. Søgurnar venda sær til ungdómin og viðgera evni sum valdsmisnýtslu, dupultmoral og seksualitet. Høvundurin hevur gjørt til tilhoyrandi arbeiðshefti til undirvísingarbrúk. Í heftinum eru uppgávur til einstøku søgurnar og annað viðkomandi tilfar. "Glasbúrið" hóskar væl sum undirvísingartilfar til fyrsta ella annað árið á miðnámi.

# Sámal Soll: Virus, 2019




"Virus" er annað stuttsøgusavnið eftir Sámal Soll og kom út í 2019. Søgurnar venda sær til ungdómin og viðgera evni sum valdsmisnýtslu, dupultmoral og seksualitet. Høvundurin hevur gjørt til tilhoyrandi arbeiðshefti til undirvísingarbrúk. Í heftinum eru uppgávur til einstøku søgurnar og annað viðkomandi tilfar. "Virus" hóskar væl sum undirvísingartilfar til fyrsta ella annað árið á miðnámi.

## Svartideyði og aðrar spøkilsissøgur




Stuttsøgusavn við 10 spøkilsissøgum fyri ung. Um flennandi húðarklæddar skøltar, um ungan mann í hamferð, um gult, slímut, blóðsprongt eygað, um smsboð, ið boða frá ófrættum og mangt, mangt annað óhugnaligt.

## Rói Patursson: Líkasum, 1985




Yrkingasavn í sjey pørtum. Rói Patursson fekk í 1986 Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri savnið.

## Guðrið Poulsen: Ein bein linja ein bogin, 2023

Savnið "ein bein linja ein bogin" fevnir bæði um yrkingar og fotomyndir. Kim Simonsen frá forlagnum Eksil hevur gjørt uppskot til undirvísingargongd, sum leggur dent á lesaraupplivingina og myndir og yrkingar sum fagurfrøðiligar tekstir. Undirvísingargongdin er ætlað undirvísing í føroyskum á miðnámi, men kann við smáum tillagingum eisini brúkast á yrkisnámi og í hádeild fólkaskúlans.



## Kim Simonsen: Lívfrøðiliga samansetingin í einum dropa av havvatni minnir um blóðið í mínum æðrum, 2023



Savnið arbeiðir serliga við havinum sum elementi. Í fýra pørtum setir savnið sjóneykuna á alt tað, sum fer millum fingrar okkara, og ikki minst gleðina við at venda sær móti heiminum, okkara húð, midum, virusum og tí meldrinum av bakterium, ið er lívfrøðiliga grundin undir øllum livandi. Høvundurin hevur gjørt uppskot til undirvísingargongd, sum leggur dent á lesaraupplivingina og yrkingar sum fagurfrøðiligar tekstir. Undirvísingargongdin er ætlað undirvísing í føroyskum á miðnámi, men kann við smáum tillagingum eisini brúkast á yrkisnámi og í hádeild fólkaskúlans.

## Teitur Lassen: Beint ígjøgnum hjartað, 2007



Kjarnin í bókini er "Káta hornið" hjá Teiti Lassen. Tilfarið er í 4 tættum. Mál, mentan og meiningar tekur upp málsligar, mentanarligar og samfelagsspurningar í ymsum løgum í tekstunum. Eksistentialisma viðger tilveruspurningar í tekstunum. Leikritið leiðir okkum á eina ferð gjøgnum tekstirnar við einrøðum saman við sangunum. Videolagið er at meta serstakt, tí at tað ikki beinleiðis hoyrir til fløguútgávuna. Tó eru fleiri og ótroyttir møguleikar at arbeiða við føroyskum videoløgum. Tættirnir eggja næmingunum at viðgera sangtekstirnar ymiskliga og síggja ymsu løgini, ið sangtekstur kann hava í sær, eisini hóast hann er bæði stuttur og gerandisligur. DVD er innií við videolagnum "Ongir pengar". Læraravegleiðing er til tilfarið.

## Steinbjørn B. Jacobsen: Nólsoyar Páll, 2000



Leikur um tjóðarhetjuna og menniskjað Nólsoyar Páll, og um tey, sum stóðu honum nær. Ein leikur um stórhendingar í Føroyum fyrst í 19. øld, men hann viðger eisini mál í okkara tíð.

## Martin Joensen: Skuggagestir, 2009




Sjónleikur, sangleikur og dansileikur um eitt føroyskt ballingarkvøld seinast í 80'unum. Vit fylgja nøkrum ungdómum við ymsum meiningum og við ymiskari sosialari bakgrund, teirra práti, skemti, kenslum og vónum.

## Myndir í myndum




Í bókini eru 18 myndir við spurningum til hvørja mynd.

## Jonhard Mikkelsen: Brotmyndir, 1993

Bókin er ætlað til brúks í fólkaskúlans hægsta stigi og sum byrjanartilfar á miðnámsskúlum. Bókin er ætlað at vera næsta stig frá fø-da/da-fø orðalistinum inn í bókmentir. Í orðalistanum fingu bókmentahugtøkini føroysk nøvn. Í hesi bók er roynt at lýsa hesi hugtøk eitt sindur gjøllari og geva teimum meira hold við dømum úr føroyskum skaldskapi.




## Grækaris Djurhuus Magnussen og Øssur Winthereig: Skjót journalistin, 2003

Journalistisk viðgerð av politiskum málum, sum hava verið frammi í føroysku miðlunum, umframt lýsing av ábyrgd og uppgávum journalista.

